## DAGSINS MEINING

# Heit evni

Valstríðið er nú byrjað av álvara og nøkur heit politisk evni tykjast at ganga aftur í tí, sum higartil hevur verið frammi í fjølmiðlunum. Hesi evni eru ríkisfelagsskapurin, uttanríkispolitisku heimildirnar, ES og politiski gerandisdagurin á Christiansborg. Tað er mestsum sjálvsagt, at ríkisfelagskapuirn er eitt høvuðsevni í einum fólkatingsvalstríði. Her skuldi Tjóðveldisflokkurin sjálvsagt havt eina greiða støðu, men støðan er kortini ikki so greið og einføld, sum ein kundi roknað við. Víst talar flokkurin í princippinum um Føroyar sum ein sjálsvtøðugan stat, men talað verður fyrst og fremst um at taka aktivt lut í donskum politikki.

Tjóðveldisflokkurin er sostatt heilt farin burtur frá tí fólkatingspolitikki, sum varð rikin, tá flokkurin upprunaliga fekk fólkatingsumboðan. Tá var talan um reinan mótmælispolitikk, meðan tað, sum vit nú síggja mestsum kann nevnast fyri luttøkupolitikk. Flokkurin samstarvar við ein og hvønn, sum vil samstarva við hann. Hetta er ein logisk fylgja av tí pragmatiska politikki, sum flokksformaðurin hevur rikið frá fyrsta degi. Men hesin politikkur merkir so eisini, at fólkatingið ikki gerst tann pallur fyri fullveldishugsjónini, sum hetta ting kundi verið við mótmælisstrategiini. Fullveldishugsjónin verður so afturfyri marknaðarførd á ráðstevnum og seminarum, har danskir vælmeinandi politikkarar taka lut og verða tiknir til inntøku fyri sakina. Samlaða myndin av støðu Tjóðveldisfloksins gerst eitt sindur kám og ógreið orsakað av hesari strategi, men tað skuldi ikki undra okkum, um hon gav atkvøður.

Hinir flokkarnir eru heldur ikki serstakliga greiðir, tá talan er um ríkisfelagskapin. Tó tykjast Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin at hava tikið endliga støðu og eru púra samdir: hesin spurningur skal loysast við sjálvstýris- ella yvirtøkulógini og við uttanríkispolitisku heimildunum. Sjálvstýrispurningurin er í hesum høpi púra greiður og trætan við Tjóð-veldisflokkin er mest eitt stríð um orð. Hinvegin er spurningurin um uttanríkispolitisku heimildirnar ikki nóg greiður. Tað hevur gruggað málið, at danska stjórnin hevur lagt grønlendsku heimildarlógina fyri fólkatingið, áðrenn semja er fingin um føroysku heimildirnar. Hetta er antin gjørt í tankaloysi ella er hetta gjørt við beráddum huga. Hvør orsøkin so er, kann vera eitt feitt. Virknið er føroysku heimildarlógini til miklan skaða. Umrøðan av grønlendska uppskotinum hevur longu verið málinum um føroysku heimildirnar til miklan skaða. Landsstýrið hevur tí einki í vali uttan at halda fast og ikki bakka. So má hetta mál heldur taka eitt sindur av tíð afturat. Grønlendska loysnin gevur alt ov lítið og hon gevur Tjóðveldisflokkinum so góð kort í hondina, at løgmaður fær nóg mikið við at verja avgerðina restina av valskeiðinum. Hann má tí takað stríðið við Fogh uppaftur eftir valið, um Fogh, sum øll vænta aftur gerst forsætisraðharri. Vit fara at venda aftur til onnur evni í valstríðnum í seinni greinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fólkatingssessurin, ES og Miðflokkurin

**Jenis av Rana**



VAL05

Mong eru, sum spyrja hví Miðflokkurin metir tað vera skeivt, um Føroyar gerast limir í ES. " Aðrar tjóðir ynskja limaskap og síggja slíkan at vera einastu bjarging, serliga fíggjarliga, so hví ikki vit" ? verður ført fram. Lat meg í stuttum greina støðu okkara, eina støðu, sum er vorðin enn greiðari eftir undirritanina av nýggju ES grundlógini!

Fyrst av øllum ávarða vit móti ES vegna manglandi fólkaræði. Fólkaræði, t.v.s. demokrati, hevur altíð verið ein av hornasteinunum, samfeløg á okkara leiðum hava verið grundað á, men so er ikki við ES. Kann vera at týdningurin av hesum ikki hevur verið so avgerandi, tey árini einkultu limalondini enn ikki høvdu avreitt stórsta partin av avgerðarrætti sínum til samveldið. Men støðan í dag er at lokalu parlamentini fáa minni og minni at siga, meðan ES tekur yvir og fær størri og størri avgerðarrætt yvir einstøku limalondunum. Tvs. tey demokratiskt valdu lokalu tingini víkja fyri tí ódemokratiska og centralt stýrda ES veldinum.

Men álvarligari enn hetta er tað guðloysi, sum til fulnar vísti sítt andlit undir tilevnani av nýggju grundlógini. Tóat serliga katólsku londini stríddust til tað síðsta fyri at fáa kristnu sjónarmiðini við í ES grundlógina, máttu tey lúta, og vit fingu eina grundlóg, sum ikki hevði pláss fyri Gudi. Honum, sum í síðsta enda hevur alt vald, og mátt til at varðveita, ikki bert Føroyar, men øll viðurksifti ES landanna. Men tey vrakaðu Hann, og harvið ta hjálp, sum einans hann megnar at geva, tá á stendur. Harvið hava ES lond grava egnu grøv sína- og vit hava fingið enn eina orsøk til verja okkum móti innliman í hendan felagsskap.

Vit í Miðflokkinum síggja tað vera umráðandi, her heima, og í samskifti við aðrar tjóðir, aftur og aftur at minna á, at álit okkara ongantíð má gerast menniskju ella menniskja verk, verið tað tjóðir ella felagsskapir. Álit Føroya má vera Hann, sum aldri fer at svíkja tann, sum setur álit sítt á Hann- Skapari Himins og Jarðar. Hetta førða vit fram her heima, og á fólkatingi, um álit verður víst okkum til hetta.

# Kunnu stýringsheimildir latast til ES, kunnu tær eisini latast til Føroyara

**Malan Johansen**
*Sjálvstýrisflokkurin*



VAL05

EU-grundlógin er samtykt í ES og skal nú góðkennast av limalondunum. Sum tað sær út, hevur Danmark eina positiva støðutakan yvirfyri ES-grundlógini. Hetta fær avleiðingar fyri Føroyar.

Ein samtykt av ES-grundlógini kann merkja, at Danmark letur yvir málsøki, sum til dømis gjaldoyraviðurskifti og uttanríkismál til ES at stjórna. Hetta eru mál, sum sambært heimastýrislógini ikki kunnu yvirtakast ella tað vit kalla ríkismál.

Havi ringt við at ímynda mær at føroyingar ganga við til at avgerðir, um føroysk málsøki verða latnar upp í hendurnar á politikkarum í Brússel. Avgerðirnar skulu takast í Føroyum.

Men kann Danmark lata hesi ”ríkismál” til ES at stýra, so kann Danmark eisini lata tey til føroyingar at stýra.

Uppgávan hjá mær sum fólktatingsumboð verður tí at tryggja, at tey málsøki, sum Danmark sína vegna letur til ES at stýra, á sama hátt vera latin til Føroyar at stýra, vegna Føroyar. Hetta kann antin vera gjørt við at føroyinar yvirtaka málsøkið, ella við at Føroyar í praksis yvirtaka stýringina - sum til dømis føroyingar hava, tá tað kemur til fiskiveiðusamráðingar.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.